


*Við gjaldstøðina hjá Vágatunlinum verða rokningar í hesum døgum skrivaðar við loftnaðum hondum*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Skriva rokningar við hond




**Gjaldskipanin hjá Vágatunlinum er ikki farin at virka enn. Kaðalslit hevur verið, og fólk stendur við gjaldstøðina og steðgar øllum bilum, sum koyra úr Vágum**

VÁGATUNNILIN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Bilar, sum brúka Vágatunnilin, fáa ikki brúkt ætlaðu gjaldskipanina enn. Kaðalslit ger, at skipanin ikki er tilsett, sigur leiðslan fyri Vágatunnlinum.

Tað er hósmorgun, og klokkan er umleið hálvgum tíggju. Tað er kalt uttan fyri tunnilsmunnan. Landsynningurin strýkur norður gjøgnum Vestmannasund og hevur russiskan kulda við sær. Hinumegin er Skælingur hvítnaður í erva, og teir báðir vaktarmenninir, sum standa við støðina og býta rokningar út til bilarnar, trampa í asfaltið og blaka sær, hóast teir eru væl ílætnir.

Teir standa og skriva rokningar til teir bila, sum skulu ígjøgnum tunnilin úr Vágum.

Skipanin er ikki farin at virka enn. Tað er nakað við, at onkur lutur ikki er komin fram, sigur vaktarmaðurin. Tað ber ikki til at gjalda við korti enn, tí ikki er gjørligt at draga kortið ígjøgnum automatina, greiðir hann frá.

Meðan vi práta, koma tveir bilar norðaneftir. Vaktarmennninir taka hvør sín.

Tann, sum fremri er, kemur heilt fram til støðina, meðan hin verður steðgaður nakað norðari. Hvørgin hevur kubba, og skulu tí báðir í høgru breytina.

– Góðan morgun. Hetta er ófført, heilsar væl upplagdi førarin í tí fremra bilinum og spyr, hvussu hann nú skal gera, tí hetta dugir hann ikki at brúka.

Nei, tað kann hann heldur ikki, fortelur vaktarmaðurin honum. Men hann skal fáa eina rokning við sær, sum so kann gjaldast innan tríggjar dagar.

Jú, tað má so bara verða so, tá ikki annað gerst, heldur fryntligi bilførarin, og vaktarmaðurin leggur lepan á rútin og fer at skriva.

Ætlanin ver sjálvandi, at skipanin skuldi rigga beinanveg, men til heilt greitt er, at hon riggar, verður arbeitt upp á hendan mátan, sigur leiðslna fyri Vágatunlinum í tíðindaskrivi.

Í aðrar mátar stendur einki til hjá teimum, sum ikki enn hava fingið kubba, soleiðis at skilja, at tað verður helst ikki í ár, at hann kemur. Tó kunnu tey, sum hava søkt, sleppa at koyra fyri »kubbaprís« frá tí, tey fáa váttan um, at umsókn teirra er móttikin.

Tað er so, at tað vórðu ov fáir kubbar umbidnir úr Noreg. Gravgangur er eftir teimum, og nýggj sending skal fáast. Men tað verður neyvan fyrr enn eftir nýggjár, at teir verða her.

Til ta tíð, mugu fólk, sum hava biðið um hald og fingið váttan um slíkt, koyra sum um tey høvdu kubba. Bilurin verður so avmyndaður og samanborið verður við skrásetingina hjá Vágatunlinum, áðrenn rokningin verður send.

Tey, sum ikki hava hald, skulu koyra til støðina og trýsta á knøttin, sum sigur, at tey skulu gjalda seinni. Rokning verður so útskrivað og send teimum og skal gjaldast á Posthúsinum ella í peningastovni innan tríggjar dagar.



UTTAN ÚR HEIMI

# Danska stjórnin til roynd

**ES-toppfundurin í Keypmannahavn er royndarstund hjá donsku stjórnini og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra. Alt bendir á, at stjórnin fer at klára royndina**

ES-TOPPFUNDUR
*Árni Joensen:*

Tann nýggi James Bondfilmurin »Die Another Day« verður nýttur sum samanbering við møguleikarnar hjá donsku stjórnini at sleppa burtur úr tí sera týdningarmikla ES-toppfundinum við skinninum á nøsini. Tað eru tey, sum halda, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri og sjónleikarin Pierce Brosnan líkjast ikki sørt. Tann seinni hevur staðið seg væl í tí kravmikla leiklutinum sum James Bond, og nógv bendir á, at danski forsætisráðharrin eisini fer at standa seg væl, nú hansara veruliga fyrsta royndarstund er komin.

Men tað leikar hart á. Øðrumegin borðið hevur hann tey stóru ES-londini, sum framvegis kenna seg sum stórveldi í evropeiska samveldinum, og sum hava sett seg væl og virðiliga á pengakassan hjá ES. Hinumegin hevur forsætisráðharrin umboðini hjá umsøkjaralondunum, sum hvørt í sínum lagi royna at fáa sum mest úr hesum sama kassa. Og í gjár var sjálvur George W. Bush, forseti í telefonini úr Washington við einari inniligari áheitan á danska forsætisráðharran um at geva Turkalandi ein dag fyri, nær samráðingarnar um turkiskan limaskap í ES kunnu byrja.

Í Keypmannahavn tykist semja kortini vera um, at tá saman um kemur kann Anders Fogh Rasmussen lyfta sjampanjuglasinum og ynskja sær sjálvum og feløgum sínum tillukku við einari søguligari stórhending, tá limatalið í ES fer úr 15 upp í 25. Forsætisráðharrin hevur ongantíð latið nakran vera í iva um, hvussu týdningarmikið hann metir hetta stigið, og hann hevur heldur ikki dult fyri, at fyri Danmark hevur tað sera stóran týdning, at hetta hendir júst í Keypmannahavn. Tað fer at geva Danmark og Keypmannahavn eina serstøðu í søgubókunum hjá ES og Evropa.

Tað er ikki bara forsætisráðharrin, sum er væl fyrireikaður til toppfundin. Ongantíð áður hava so nógvir løgreglumenn verið í Keypmannahavn, har helvtin av allari donsku løgregluni er savnað í hesum døgum.

## Moyrir leiðarar

Men fleiri av leiðarunum, sum nú koma til Keypmannahavnar, hava annað at hugsa um enn at taka nýggj lond upp í samveldið. Týski kanslarin, Gerhard Schrøder, hevur so stórar trupulleikar í heimlandinum sum sjáldan fyrr. Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, er komin í eldin í heimlandinum, eftir at kona hansara hevur nýtt ein svikafullan millummann í einum húsakeypi. Spanski forsætisráðharrin, Jose Maria Aznar, er fyri hvøssum atfinningum í landspartinum Galicia, har fólk í túsundatali hava mist arbeiði orsakað av oljudálkingini frá »Prestige«. At enda skal svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, skiljast, og tíðindini um skilnaðin komu fyrr út enn ætlað.

So tá saman um kemur munnu menn vera nakað moyrir, og tí munnu teir fara at góðtaka eina ella aðra loysn hjá danska forsætisráðharranum, sum ikki hevur teir stóru heimatrupulleikarnar at hugsa um.

# Tað er USA, sum ræður

**Fleiri ilskast um, at USA einsamalt fekk sær atgongd til iraksku vápnafrágreiðingina. Men hetta er bert ein staðfesting av, at USA ætlar sær at stýra Irak-kreppuni, sama hvat onnur siga**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*



*George W. Bush, forseti og stjórn hansara hava enn einaferð gjørt greitt, at tað er USA, sum ger av, hvussu Irak-kreppan skal loysast*

Ósemjan um ta iraksku vápnafrágreiðoingina tók seg upp seinasta vikuskiftið.

Fríggjadagin samdust tey fimtan limalondini í trygdarráðnum hjá ST um, at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST og altjóða kjarnorkustovnurin í Wien skuldu sleppa at síggja frágreiðingina fyrst. Men dagin eftir broytti USA støðu og noyddi formannin í trygdarráðnum, kolombiska ST-sendiharran Alfonso Valdivieso, at útflýggja frágreiðingina.

Amerikanskir diplomatar fóru síðani við flogfari úr New York til Washington við iraksku frágreiðingini. Har varð hon so margfaldað og síðani latin hinum føstu limunum í trygdarráðnum. Samstundis varð fráboðað, at hini londini í ráðnum skuldu fáa eina minni útgávu av frágreiðingini.

Noreg og Sýrialand, sum eru í trygdarráðnum, hava mótmælt amerikansku framferðini, men altjóða serfrøðingar siga, at amerikanska framferðin í hesum máli vísir bert, at USA ætlar sær at stýra Irak-kreppuni, sama hvat onnur lond siga.

– Tað er heilt týðiligt, at USA við hesum roynir at vísa heiminum, at tað er Washington og ikki ST, sum avger, hvat skal henda, sigur William Hopkinson á Royal Institute of International Affairs í London. Aðrir serfrøðingar hava somu áskoðan.

## Annan til Danmarkar

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, boðaði mikudagin frá, at hann kemur til Keypmannahavnar í sambandi við ES-toppfundin.

Ørindini hjá aðalskrivaranum eru at royna at fáa gongd á stríðið millum grikkar og turkar á Kýpros. ST legði herfyri eina friðarætlan fyri teir báðar partarnar, men mikudagin segði leiðarin hjá kýprisku turkunum, Rauf Denktash, at hansara fólk kann ikki taka undir við ætlanini hjá ST.

Grikski parturin av Kýpros fær eftir ætlanini limaskap í ES á toppfundinum í Keypmannahavn, og higartil hevur verið hildið, at hetta fórn at seta ferð á friðartilgongdina á oynni. Tí kemur Kofi Annan til Danmarkar at gera enn eina roynd at fáa partarnar til samráðingarborðið. Umboð fyri griksku og tukrisku kýprarnar eru í Keypmannahavn í sambandi við toppfundin.

## Minni dálking

Bretsku myndugleikarnir hava nú boðað frá, at dálkingin frá kjarnorkuendurvinningarverkinum Sellafield skal avmarkast munandi.

Margaret Beckett, umhvørvismálaráðhari sigur, at ætlanin er at skipa so fyri, at minni technetium-99 verður latið út í havøkið við Sellafield. Sambært ráðharranum skal útlátið skerjast so nógv, at í 2006 verður útlátið bara ein níggjundapart av tí, sum tað er í dag.

Margaret beckett sigur, at tað er ikki vísindaliga prógvað, at hetta útlátið er skaðiligt fyri umhvørvið ella heilsuskaðiligt, men at stjórnin í London hevur staðfest, at útlátið hevur elvt til ótta í fleiri øðrum londum. Norska stjórnin hevur longu boðað frá, at hon er sera væl nøgd við avgerðina hjá bretska umhvørvismálaráðharranum at avmarka dálkingina frá Sellafield-verkinum.

## Klár at rýma

Starvsfólkini á teimum norsku sendistovunum í Miðeystri hava seinastu dagarnar eftirkannað sínar tilbúgvingarætlanir, samstundis sum tey fyrireika seg til at rýma, skuldu amerikanarar lopið á Irak.

Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Oslo, Karsten Klepsvik, váttar tíðindini, men leggur afturat, at hetta er vanlig mannagongd á sendistovum í økjum, har vandi er fyri ófriði ella kríggi. Á norsku sendistovuni í Amman í Jordan verður sagt, at har hava tey fyrireikað seg til at fara av landinum, brestur kríggj á, tí eitt kríggj við Irak fer uttan iva at hava við sær, at øll flúgving til og úr Jordan steðgar.

Jordan styðjar USA í stríðnum við Irak, men sambært norsku sendistovuni styðjar meginparturin av jordanska fólkinum Irak. Tað er tí ikki óhugsandi, at vesturlendingar verða illa sæddir í Jordan, leypa amerikanarar á Irak, verður sagt.

## Bumbumenn kendu hvør annan

Løgreglan í Indonesia sigur, at menninir, sum skipaðu fyri teirri ógvusligu bumbuspreingingini á Bali í oktober, og teir, sum løgdu eina bumbu við eina matstovu á oynni Sulawesi tann 4. desember, kendu hvør annan.

Bumbuspreingingin á Bali kravdi meiri enn 190 mannalív. Bumban, sum brast uttan fyri eina matstovu hjá McDonalds á Sulawesi fyri 14 døgum síðani, kravdi trý mannalív.

Indonesiski løgregluovastin sigur, at løgeglan nú er í ferð við at kanna, um tær báðar bumbuatsóknirnar vóru liðir í einari størri atsókn. Kortini verða teir báðir tilburðirnir framvegis kannaðir hvør sær, sigur hann.